SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# NØVN

## 80 ára føðingardagur

Týsdagin 17. oktober fyllir Bjarni Jøkladal 80 ár. Føðingardagurin verður hildin frá klokkan 12 í heimi teirra í Torkilsgøtu 3 í Hoyvík.



# Bilframsýning í Miðlahúsinum

**Leygardagin 14. oktober verður bilframsýning í Miðlagarðinum í Miðlahúsinum í Vágsbotni.**



*Pontiac G6 coupé verður sýndur fram í Miðlagarðinum leygardagin*

*Mynd: Høgni Thomsen*

Tað er Finnbogi Poulsen á Eiði, sum sýnir fram ein Pontiac G6 GT coupé.

Hetta man vera fyrsti nýggi Pontiac í longri tíð, sum er komin til Føroyar.

Finnbogi umboðar GM bilarnar Pontiac og GMC. Umframt hendan coupé, fæst G6 eisini sum sedan og sum convertible. Pontiac fáast annars eisini í bæði minni og størri modellum enn G6.

Finnbogi Poulsen sigur, at hóast hesin Pontiac G6 hevur 3,5 litur V6 motor við 224 hk, brúkar hann litið bensin í mun til motorstøddina - hann koyrir umleið 10 km/l.

Framsýningin er opin frá kl. 10-14, har høvi verður hjá fólki at síggja og royndarkoyra bilin.



Opel Corsa:

## Ársins bilur í Danmark 2007

Nýggi Opel Corsa varð mikudagin kosin ”Årets Bil i Danmark 2007” av Motorjournalisternes Klub i Danmark (MKD). Opel Corsa fekk 206 stig út av 290 møguligum.

Heimspremiera av nýggja Corsa varð á The British International Motor Show í London í juli. Frá Auto Service verður sagt, at bilurin verður í Føroyum mánadagin.

# Grein 13 kanningar um alt landið

**Í døgunum frá 16. oktober til 29. oktober ger politiið grein 13 kanningar um alt landið. Ferðslutrygd og politiið heitir á øll í ferðsluni um at vera ansin og hugsa um trygdina**

TÍÐINDASKRIV
*Ferðslutrygd og politiið*

Nú summarið er farið afturum og myrka tíðin komin, eru aftur í ár akfør, sum koyra uttan at hava ljósini í lagi.

Møguleikin fyri at síggja og verða sæddur er munandi minni hjá hesum bilførarum. Teir hava eina ábyrgd, sum teir eiga at røkja betur, so skaði ikki stendst av teirra atburði.

Ráðið Fyri Ferðslutrygd og politiið vilja heita á ferðandi til gongu ella á súkklu um at nýta endurskin og øll koyrandi um at tryggja, at ljósini eru í lagi og verða brúkt.



Fyri at minna øll um ferðslutrygdina, hevur Ráðið Fyri Ferðslutrygd lýsingaherferð um hesi viðurskifti í tíðarskeiðinum frá 9. oktober til 22. oktober.

Somuleiðis hevur politiið grein 13 kanningar um alt landið í tíðarskeiðinum frá 16. oktober til 29. oktober.

Seinasta heyst var lýst við hesum átøkum, men álíkavæl vóru bøtur givnar fyri tilsamans 120.000 kr.

Av steðgaðu bilunum høvdu 136 ikki ljósini í lagi, 206 ferðandi í bili brúktu ikki bilbeltið og á 27 bilum vóru dekkini ikki í lagi. Somuleiðis fingu 81 bilførarar bót fyri ikki at hava koyrikortið uppi á sær.

Ferðslutrygd og politiið heitir á øll í ferðsluni um at vera ansin og hugsa um trygdina. Vónandi verður tað ikki neyðugt hjá politinum at geva eins nógvar bøtur sum undanfarin ár.

## Andlát og jarðarferðir

**Rói Slættalíð Dam**, lítli sonur Maiken og Anfinn Dam, Norðskála, andaðist týsdagin 10. oktober, 2 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Karolina Petersen**, Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 11. oktober, 82 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin klokkan 19. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Karolinu, kunnu lata Vistarheimunum í Havn eina gávu, konta í Føroya Sparikassa.

**Knút Joensen** í Sandavági andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 9. oktober, 77 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrshúskapellinum hósdagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju fríggjadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Knút, kunnu lata eina gávu til Meinigheitshúsið ella kirkjuna í Sandavági.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæra kona og mamma okkara

**Karolina Petersen**
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum
mikudagin 11. oktober, 82 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
fríggjadagin kl. 19.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
leygardagin kl. 13.00.

**Petur og Kári**

*Í sta›in fyri blómur ella krans ber til at lata eina peningagávu til Vistarheimini í Havn, konto í Føroya Sparikassa.*

## Dagurin í morgin

**13. oktober. Angelus**. Fleiri halgimenni bera hetta navn, sum er latínskt og merkir *eingil*, tað er sendiboð.

## 80 ára føðingardagur

Í dag, 12. oktobur fyllir Absalon Jacobsen í Vági 80 ár. Føðingardagin er hann staddur í Tórshavn. Tey, sum ynskja at heilsa uppá Absalon, eru vælkomin í J. H. Schrøtersgøtu 9 frá kl. 17.00.